# Jóannes og Lisbeth gera ein brølara

**– Siga Lisbeth Petersen og Jóannes Eidesgaard, at tey kunnu taka undir við samgonguskjalinum, hava tey valla hugsað seg nóg væl um, sigur Jenis av Rana**

NÝGGJ SAMGONGA
*Áki Bertholdsen*



*– Tað tykist sum um bæði Lisbeth Petersen og Jóannes Eidesgaard hava gloymt fortíðina, heldur Jenis av Rana*

*Mynd: Finnur Justinussen*

– Siga Jóannes Eidesgaard og Lisbeth Petersen at tey kunnu taka undir við samgonguskjalinum, gera tey ein brølara.

Jenis av Rana, formaður í miðflokkinum, sum er minsti flokkur í nýggju fýra-flokka samgonguni, heldur ikki, at formenninir í teimum báðum flokkunum hava hugsað seg nóg væl um, áðrenn tey søgdu sína hugsan um nýggja samgonguskjalið.

Jóannes Eidesgaard sigur, at á ríkisrættarliga økinum liggur samgonguskjalið innanfyri tað, sum javnaðarflokkurin kann góðtaka.

Lisbeth Petersen hevur sagt, at sambandsflokkurin hevur heldur ikki stórvegis trupulleikar av tí partinum av samgonguskjalinum, har ríkisrættarligu málini eru viðgjørd, tí tað týdningarmesta er, at fullveldið er slept.

– Hetta er ein grundleggjandi brølari, tí fullveldið er alt annað enn slept, sigur Jenis av Rana, tí hann sigur, at sjálvsagt stevnir nýggja samgongan við beinari kós fram ímóti fullveldinum.

### Gloyma fortíðina

Jenis av Rana sigur, at tað tykist sum um bæði Lisbeth Petersen og Jóannes Eidesgaard hava gloymt fortíðina.

– Tað er løgið at tey hava gloymt, at løgtingssamtyktin um sjálvstýri Føroya Fólks er samtykt og hon stendur framvegis við. Og tað er hendan samtyktin, sum nýggja samgongan byggir á.

– Sostatt byggir hendan nýggja samgongan á at tað arbeiðið, sum undanfarna samgonga gjørdi, skal førast víðari og endamálið við politikkinum er sjálvsagt fullveldið.

– At halda nakað annað, er eitt grundleggjandi mistak, ger hann púra greitt.

– Siga teir stóru andstøðuflokkarnir, at teir taka undir við samgonguskjalinum, siga teir framvegis, at teir taka undir við tí politikki, sum er førdur á ríkisrættarliga økinum, har endamálið er, at vit skulu hava fullveldið. Men tað meina javnaðar- og sambandsflokkurin valla og tí er tað illa umhugsað, tá ið tey nú siga seg kunna taka undir við samgonguskjalinum.

Hann vísir á, at tað, sum Jóannes Eidesgaard sigur nú, er ikki annað enn akkurát tað sama sum hann segði fyri fýra árum síðani, tí tá kunngjørdi hann eisini, at hann kundi taka undir við kósini, sum samgongan tá legði í ríkisrættarliga spurninginum.

Men tann politikkur, ið javnaðarflokkurin førdi, prógvaði nakað heilt annað, so spennandi verður at fylgja við, hvussu verður hesuferð....

### Sera umráðandi

Jenis av Rana sigur, at tá ið miðflokkurin fór uppí samráðingarnar um at skipa samgongu, var tað sera týdningarmikið fyri flokkin, at nýggja samgonguskjalið skuldi vera eitt greitt tekin úteftir um, at fullveldisgongdin í Føroyum heldur fram.

– Tað hevði alstóran týdning fyri okkum, at signalið úteftir var púra greitt, heldur enn tey tær ørkymlandi ábendingar, sum eru komnar seinastu árini, at aðruhvørja løtu eru vit á fullveldiskós, men at so onkur stígur fram annar dagin eftir og ger greitt, at tað eru vit ikki kortini, tí tað gjørdi, at ongin tók okkum fyri fult.

Jenis av Rana sigur, at miðflokkurin tekur undir við sjálvstýrissamtyktini uttan tí partinum sum sigur, at blokkurin skal skerjast.

– Sum so hava vit onki ímóti at blokkurin minkar. Men vit vilja fyrst hava fulla greiði á, hvat blokkurin er. Er blokkurin okkara rættvísa ogn, er ongin orsøk til at lata danir fáa hann.

Tað, sum formaður miðfloksins sipar til, er, at m.a. skal greiða fáast á, antin danir spara limagjald til NATO fyri at hava støðir í Føroyum, ella ikki.

– Spara danir endurgjald til NATO fyri støðirnar í Føroyum, er talan um eitt endurgjald, sum vit av røttum eiga og tað skulu vit ikki lata dønum, sigur Jenis av Rana.

# Stórfingin bygdarstevna á Strondum

*Tíðindaskriv*

Bygdastevna verður á Strondum hetta vikuskiftið. Tað eru Strálan og StÍF sum skipa fyri. Stevnan byrjar við diskoteki í kvøld á midnátt. Annars verður ymiskt á skránni hesar dagar, skriva fyrireikararnir í einum tíðindaskrivi.

Leygardagin verður stevnubingo, súkklukapping og sjavsur. Ein listaframsýning letir eisini upp. Báðar dagarnar verður tivoli, hoppiborg, hamaraslag o.a. Møguleiki verður at syngja saman leygarkvøldið. Kvøldið endar við dansi, har tann sera vælumtókti bólkurin All That Rain spælir. Skipað verður soleiðis fyri, at bussur koyrir úr Steinatúni í Havn klokkan 22:30 og heim aftur eftir dansin.

Sunudagurin byrjar við gudstænastu. Kappróðurin byrjar klokkan 15.00. Róð verður 1000 og 1500 metrar. Eftir kappróðurin verður ymiskt at fara til. Skemtidystur verður millum skálakonur og strandakonur.

Og børnini hava strandingar eisini hugsað um. Angela úr sendingini Fres og klovnurin Hanniball koma at undirhalda. Eingin stevna utta vørutombola og eydnuhjól, sum eisini verður á skránni.

Og ein stevna er ikki bara tað sum stendur í skránni, hon er so nógv annað. Hon er prát, hon merkir at fólk koma á gátt, sum annars ikki koma á gátt. Hon merkir samanhald og gleði.

Og stevnan endar við einum útimøti, sum missiónshúsið skipar fyri.



# ítróttur

Nr. 107 • leygardagur • 8. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

B36-NSÍ:

## Próvtøka

**Annað vikuskiftið upp í slag hevur B36 heimavøll móti einum av kappingarneytunum í oddinum, og heldur ikki hesa ferð eru ráð til mistøk frá nøkrum parti**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*



*Í steypakappingini var NSÍ frammanfyri B36. Spurningurin er nú, um teir megna at endurtaka sigurin frá teirri ferðini*

Tá B36 fyri viku síðani vann trygt á toftamonnum, var tað samstundis eitt slag av signali til hini liðini í deildini, at nú er árstalsfelagið um at koma fyri seg eftir eina heldur trilvandi byrjan.

Ein einsamallur sigur nýttar tó lítið í stóru myndini, og tí er B36 enn einaferð til próvtøku, tá teir sunnudagin taka ímóti runavíkingum, sum eisini eru til eitt slag av próvtøku. NSÍ tráðar aftur í ár móti heiðursmerkjaplássunum, har teir ongan tíð hava verið fyrr, men nú er kanska líkt til, at meira álvara er í ætlanunum enn vanligt. Javnleikurin á Toftum í miðvikuni mundi ikki vera heilt av leið, og fáa teir eisini stig við sær sunnudagin fer at líkjast heilt væl hjá teimum gulu.

### Miðvøllurin burtur

Og okkurt, er sum bendir á, at talan verður um eina sera trupla uppgávu hjá B36. Umframt harða móstøðu, so hevur B36 hópin av skaðum at dragast við, og at kalla allir hesar tykjast hava rakt miðvøllin, sum helst skal rættiliga um-møblerast í mun til seinasta dystin.

Teir báðir rumensku leikararnir, Din Sandu og Julian Florescu, vórðu báðir skiftir út móti B68 vegna skalða, og enn hava teir so ikki vant hesa vikuna. Tað hevur Klæmint endiliga gjørt, men spurningurin er, um B36 venjarin torir at vága eyma fótliðið enn einaferð, eftir úrslitið sum hetta gav móti HB. Kenneth Jacobsen hevur annars verið ein góður vikarur hjá Klæminti, men hann fekk skaða undir venjing mikukvøldið, og teir tríggir, Áki Mørk, Niels Joensen og Karl Leonsson, ið allir kunnu roknast sum avloysarar á miðvøllinum, hava eisini skaðar at dragast við.

Umframt allar miðvallarleikarnar er Tróndur Vatnhamar eisini meira enn ivasamur eftir skaðan, sum han fekk móti B68. Ta ferðina merkti tað tó ikki tað stóra fyri B36, tí René Tórgarð stóð sum ein brandur, tá hann kom á vøllin, so spurningurin er, hvørt eitt skifti aftur er farið fram í hørðu málverja kappingini hjá B36.

### Allir tøkir

Hjá NSÍ tykist eingin leikari at vera burturfrá, tá teir koma suður.

Ofta verður tað tungt hjá leikarunum, tá dystirnir gerast so tættir, sum teir eru nú hjá runavíkingunum, men hóast onkur smávegis prus komu í grannauppgerðini móti B68, so tykjast allir mans tó at vera klárir undan vikuskiftinum. Eisini Christian Høgni Jacobsen, sum noyddist út beint fyri hálvleik, tá hann merkti okkurt í lærinum.

Spurningurin er so, hvussu Jógvan Martin Olsen blandar kortini hesaferð. Í steypakappingini vann NSÍ, tá teir vitjaðu í Havn, so uppskriftin til stigini skuldi verið til staðar. Spurningurin er bara, hvørt hon verður nýtt á rættan hátt.

B68–HB:

## Skert oddalið fer á Svangaskarð

**B68 tekur ímóti HB á grasvøllinum á Svangaskarði, har oddaliðið fer at sakna tríggjar av teimum, sum hava verið fastir á liðnum higartil í ár**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



*Toftamenn fyrireika seg til Inter-Toto dystirnar, og tí verður tað á grasvøllinum, at dysturin móti HB verður spældur*

B68 hevur nógv á skránni í hesum døgum. Mikukvøldið spældu teir landskappingardyst ímóti NSÍ, í morgin skulu teir spæla landskappingardyst ímóti HB, og hóskvøldið skulu teir spæla seinnu hálvfinaluna ímóti NSÍ. Mikukvøldið var dysturin á graslíkinum á Svangaskarði. Í morgin og hóskvøldið í komandi viku fer at verða spælt á grasvøllinum á Svangaskarði.

– Liðið hjá okkum fyrireikar seg til Intertoto kappingina. Teir dystirnir verða á grasi, og tí er tað náturligt, at vit venja og spæla á grasi. Hetta átti at verið heilt upplagt undan altjóða dystum, og eisini tá vit eiga ein grasvøll, sum sær gott út, nú tað hevur verið turt og lýkka hevur verið í luftini, og tað harvið hevur verið góður gróður.

Hetta sigur Niclas Davidsen, sum er formaður í B68. Ásetingarnar siga, at mótstøðuliðini skulu hava boð tíggju dagar undan dystardegnum, um dysturin skal spælast á grasi og ikki á graslíki.

HB spælararnir hava so at siga uttan undantak spælt nógv á grasi. Her verður bæði hugsað um meiri tilkomnu spælararnar, sum hava spælt á landsliðnum og í Europa Cup, umframt at onkrir teirra hava verið í útlendskum feløgum, og her verður eisini hugsað um yngru menninar, sum hava verið nógv á yngru landsliðunum.

HB vann góðan 2–0 sigur í hálvfinaluni í steypakappingini, tá teir grundlógardag vóru í Vági. Men sigurin var dýrt vunnin. Tór–Ingar Akselsen noyddist út heilt skjótt, tí hann varð vøddaskaddur. Hallur Danielsen beklaði illa. Hesir báðir eru sera ivasamir í morgin. Tað er greitt, at Jóhannis Joensen verður ikki við. Hann sá gula kortið í málleysa landskappingardystinum í Vági sunnudagin og er leikbannaður.

Møguligir avloysarar eru Janus M. Joensen og blaðungu menninir Rókur av Fløtum Jespersen, Bjarni Jørgensen og Emil Nolsøe Leifsson. Hesir eru allir sera evnaríkir.

Hjá B68 er Anders Nygaard framvegis skaddur. Teir duga ikki at siga, nær hann verður tøkur aftur, men teir vóna, at hann verður vi, tá teir um tvær vikur fara til Sveis at spæla í Intertoto Cup. Arnold Joensen var leikbannaður mikukvøldið, tí hann varð útvístur ímóti B36 sunnudagin. Nú er hann tøkur aftur.

Spurningurin er so, hvussu Frank Skytte fer at seta liðið saman. Mikukvøldið spældu teir 4–4–2, meðan teir frammanundan í landskappingini hava spælt 4–3–3. HB er tvey stig frammanfyri B68, og teir hava spælt ein dyst færri. Tað vil siga, at tað er av alstórum týdningi hjá B68 at fáa stig í morgin, og teir skulu helst vinna. Men á Toftum ásanna teir, at tað verður trupult, tí HB hevur staðið seg betri higartil í ár, enn øll hini liðini hava gjørt.